# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



Tann 23. desember áttu Ingrid og Gissur Patursson ein son. Hann vigaði 3950 gr og var 54 cm. langur.

Ein stolt systur Guðrið 8 ár við nýføddu beiggjanum.

19. desember fingu Katja í Jógvanstovu og Morten Joensen, Norðragøta, ein son. Hann var 47 cm. langur og vigaði 2065 gr.

21. desember fingu Súsanna og Jákup Petur Eliassen, Hoyvík, ein son. Hann var 60 cm. langur og vigaði 5180 gr.

21. desember fingu Anita og Kaj Anker Joensen, Glyvrar, ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 4600 gr.

22. desember fingu Hildur Krossteig Mortensen og Petur Martin Poulsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 2870 gr.

22. desember fingu Hansa og Tummas Símin Høj, Saltangará, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3600 gr.

22. desember fingu Joan og Jógvan Hansen, Klaksvík, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4690 gr.

22. desember fingu Oydis Petersen og Tommy Næs Djurhuus, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4390 gr.

22. desember fingu Tina Rasmussen og Bogi Rasmussen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3950 gr.

23. desember fingu Nencia Thomassen og Jákup Faldvard, Sørvágur, ein son. Hann var 50,5 cm. langur og vigaði 3330 gr.



24. desember fingu Helga S. Isaksen, Søldarfjørður og Aksel T. Mikkelsen, Syðrugøta, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4200 gr.

27. desember fingu Elsa M. Dam og Dánjal Jákup Vilhelm, Norðskáli, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4300 gr.

28. desember fingu Sára Skylv Reinert og Arngrím Thomassen, Sandavágur, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4000 gr.

## Sunneva og Henning Johannesen gullbrúdleyp



Leygardagin 31. desember, verður ein stórur dagur á Argjum, tá ið Sunneva og Henning Johannesen kunnu halda gullbrúdleyp. Stóri dagurin verður hildin í Róðrarneystinum á Argjum fríggjadagin 30. desember fyri yvir 200 fólkum.

Mamma er fødd 18. september 1935, og er hon ættað av Argjum, foreldrini vóru Hansina og Johannis Henriksen. Hansina var av Argjum og Johannis var úr Árnafirði.

Mamma flutti norður til ommu sína í Árnafirði, tá ið pápi hennara bert 33 ára gamal doyði av tuberklum, tá var hon bert 3 ára gomul. Hon plagar ofta at tosa um tað góðu tíðina, hon hevði meðan hon vaks upp í Árnafirði. Hon búði hjá ommu síni til hon var 14 ára gomul, tá ið hon fór í húspláss, fyrst í Skopun, síðani til Klaksvíkar, har hon kom í húspláss hjá Margit og Kaj Hansen í Víkunum. Aftan á at mamma og pápi búsettu seg á Argjum, arbeiddi mamma eina tíð á Bacalao, men eftir eina operatión í rygginum, sum tók ein part av arbeiðsførleikanum, vaskaði hon í skúlanum á Argjum og Albert Hall.

Pápi er føddur 17. juli 1934, og er hann ættaður úr Horni í Klaksvík. Foreldrini vóru Jenny og Palli Johannesen. Jenny var av Sevmýri á Tvøroyri og Palli úr Horni í Klaksvík. Pápi vaks upp í Klaksvík; men eisini hann misti pápan bert 14 ára gamal, eisini hann doyði av tuberklum.

15 ára gamal fór hann til skips við Streymoynni, sum var ein slupp við motori.

Seinni róði hann út, til hann fór við Kallsenni, síðani við Brandur Sigmundarson, sum vóru síðutrolarar. Í 1969 fór hann við Stellu Karinu, sum var ein av mest framkomnu fabrikstrolarum tá í tíðini. Í 1972 legðist pápi heima og fór at rógva út. Eisini fekk hann sær prógv til heimaskipara og førdi onkran trolbát á landleiðini. Seinnu árini arbeiddi hann hjá Argja kommunu, og enn arbeiðir hann á Fiskavirking.

Betur foreldur kann ein ikki fáa. Vit høvdu ein uppvøkstur, har vit ongantíð manglaðu nakað. Nú var tað mest mamma, sum tók sær av okkum, meðan vit vuksu upp, tá ið pápi bert var heima í einar 10 til 14 dagar millum túrarnar, sum vardu upp til seks mánaðir. So tað var kanska ikki so undarligt, at tann yngsti beiggin ræddist pápa, tá hann kom heim ta einu ferðina.

Nú eru tað blivin 21 børn, sum tey eru omma og abbi at, og 8 langommu- og langabbabørn.

**Børnini**

## Regin Haraldsen 50 ár



Nýggjársaftan fyllir Regin Haraldsen í Havn 50.

Regin er ein kend býarmynd. Tað man mangan hava komið væl við hjá fólki í Tórshavnar kommunu at fáa vitjan av Regini við slamsúgvaranum. Einki kann verða so keðiligt sum hava trupulleikar við kloakkskipanini. Tá hevur Regin mangan við sínum hollu royndum innan sítt fak, loyst trupulleikan bæði skjótt og væl.

Hann hevur havt ábyrgd av slamsúgvaranum í mong ár. Fyrst tá pápin, Jógvan Haraldsen, hevði renovatiónina í Havn, og seinnu árini hjá Tórshavanr kommunu.

Regin hevur stóran áhuga í fótbólti og er íðin B36 viðhaldsmaður, og ferðast hann ofta við Flokksmonnum kring landið, tá B36 spælir.

Vit ynskja Regini hjartaliga tillukku við degnum.

**Heilsan nakrir B36-arar**

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Dagurin**

**31. desember. Sylvester,** deyður ár 335. Pávi, sum sigst at hava doypt fyrsta kristna keisaran Konstantin Mikla. Sylvester var tann pávin, sum fór undir at byggja Pæturskirkjuna. Dagurin er nýggjársaftan og verður eisini róptur gamlaárskvøld.

**1. januar. Nýggjársdagur.** Sum kirkjuligur heiligdagur hevur hann eisini borið navnið Circumcisio Domini (umskering Harrans), ið sipar til at áttanda dagin eftir føðingina, varð Jesus sum allir jødiskir dreingir umskorin.

*Hákun kongur Sverrason (føddur í Føroyum) doyði í Bergen hendan dagin í 1204.*

**2. januar. Ábal.** Dagurin verður nevndur Ábal eftir øðrum soninum hjá Ádami og Evu, sum bróðurin Káin drap (1. Mós., 4, 1-16). Týdningurin av navninum er óvissur.